# Sjúkrahússtjóri ólógliga uppsagdur

**Tað loysti seg hjá Jákupi Mørkøre, fyrrverandi sjúkrahússtjóra, at vera treiskur. Týsdagin segði Føroya rættur, at hann varð uppsagdur av órøttum og hvørki var ólýðin ella illoyalur**

UPPREISN
*Ingi Rasmussen*



Fyrrverandi stjóri á Landssjúkrahúsinum, Jákup Mørkøre, fekk uppreisn í Føroya rætti týsdagin, eftir at hava stríðst fyri sínari sak í trý ár.

Rætturin gjørdi greitt, at Jákup Mørkøre varð ólógliga sagdur úr starvi, tá Helena Dam á Neystabø, táverandi landsstýriskvinna, gav honum sekkin í januar 2000 og í uppsagnarbrævinum segði hann vera bæði ólýdnan og illoyalan. Tey orðini dømdi Føroya rættur verða ógrundað, og tískil staðfesti rætturin, at hann var uppsagdur ólógliga.

Heilsumálaráðið er dømt at rinda Jákupi Mørkøre 60.000 krónur í endurgjaldi, og harumframt skal ráðið rinda 40.000 krónur í sakarmálskostnaði.

Við dóminum kann Føroya rættur sigast at vera komin í andsøgn við seg sjálvan. Upprunaliga stevndi Jákup Mørkøre nevniliga Helenu Dam á Neystabø fyri ærumeiðing, men ta ferðina tapti hann í rættinum. Helst tí hann sjálvur var við til at breiða uppsagnargrundina út.

Jákup Mørkøre ætlaði sær at kæra málið fyri Landsrættin, men semja varð gjørd um at sleppa málinum. Í staðin stevndi hann Heilsumálaráðnum fyri Føroyarætt og royndi málið av nýggjum. Hesaferð eydnaðist, og hann fekk loksins uppreisn.

Í dag er Jákup Mørkøre stjóri í TK-stovuni.

# Hans Petur og Ólavur spæla á Café Natúr

Næstu 10 dagarnar fara tveir føroyskir tónleikaútisetar at spæla á Café Natúr í Havn.

Talan er um teir báðar Hans Petur í Brekkunum og Ólav Olsen, sum báðir koma heim úr Dnamark við blásiljóðførum í skjáttuni.

Hans Petur spælir saxofon og Ólavur trompet.

Teir fara at spæla á Café Natúr næstu tíðina. Hesa vikuna frá hóskvøldinum til sunnukvøldið, og í næstu viku frá mikukvøldinum til leygarkvøldið.

Teir fara at spæla ymiskan tónleik, og millum annað hava teir eisini vant sangir úr Grønu Bók, um fólk skuldu havt hug at sungið við.



*Hans Petur í Brekkunum og Ólavur Olsen blása í Havn komandi dagarnar*

# Gongur eitt sindur afturá

**Guðrun missir bæði á Hit-listanum og á Tjeklistanum í Danmark hesa vikuna**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Nýggjastu hitlistatíðindini um Guðrun S. Jacobsen er, at hon missir nøkur pláss á teimum báðum fremstu donsku hitlistunum hesa vikuna.

Hit-listen ger hvørja viku plátusøluna í Danmark upp, og eftir at Guðrun í farnu viku lá aftur sum nummar 2 á hesum lista, er hon dottin niður á 7. pláss hesa vikuna. Guðrun hevur nú verið í seks vikur á listanum.

Big Fat Snake, sum hava átt oddasessin á listanum seinastu vikurnar, muga hesa vikuna lúta fyri David Bowie, sum er komin beinleiðis inn sum nummar 1.

Á Tjeklistanum, sum P3 hjá Danmarks Radio stendur fyri, er Guðrun hesa vikuna nummar 20. Hon hevur verið uppi á 15. plássi og vent við sanginum You´re Mine.



*Guðrun fer niður á teimum fremstu donsku hitlistunum*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## 35 ára starvsdagur á Landssjúkrahúsinum



1. oktober hevði Óli Kurt Hansen í Havn arbeitt í køkinum á Landssjúkrahúsinum í 35 ár.

Óli Kurt er havnarmaður, føddur í 1934, foreldirni vóru Inga, f. Jacobsen, ættað úr Vági, og Rólant L. Hansen í Havn.

Sum 14 ára gamal fór Óli Kurt í bakaralæru hjá Frants Restorff, har var hann í tilsamans 7 ár. Eftir tað arbeiddi hann í minkagarðunum í Hoydølum í eini 3-4 ár, til hann fór til Íslands at passa hønur á einum bóndagarði á Bessastøðum. Ásgeir Ásgeirsson var íslendskur forsteti tá. Eftir at hava passað hønur í eini tvey ár fór hann til Reykjavíkar, har hann arbeiddi sum bakari í 3 ár.

Tá hann kom aftur til Føroya, fekk hann, 1. oktober 1968, starv í køkinum á Landssjúkrahúsinum, sum var spildurnýggjur tá, og arbeiðir hann har enn.

Óli Kurt er eisini kendur innan sjónleik og barnaútvarp. Hann spældi sjónleik, tá hann búði í Íslandi, og hevur hann eisini t.d. spælt sjónleik í Sjónleikarhúsinum í Havn, í Glæmuni í Kvívík og í Norðurlandahúsinum.

Hann var í barnaútvarpinum saman við Hermanni Jacobsen og síðan saman við Elin Mouritsen. Elin & Óli vóru sera væl umtókt millum bæði børn og vaksin miðskeiðis í 70-unum.

## Jefri Justinussen 65



30. september fylti Jefri Justinussen í Havn 65 ár. Jefri er føddur og uppvaksin í Leirvík, sonur Minu, f. Vang, úr Kálvhúsinum á Glyvrum og Absalon Justinussen, vanliga nevndur Absalon á Garði, í Leirvík.

Jefri hevur siglt síðan hann var ungur, og fyrr í ár kundi hann halda sín 50 ára starvsdag í fiskivinnuni. Hann fór fyrstu ferð til skips við sluppini Lizzie í 1953.

Hann fór á skiparaskúla í 1959 og tók prógv á sumri í 1960. Hann sigldi sum dekkari við línubátinum Bresti hjá P/F Kimbil frá 1961-63. Brestir var fyrsta føroyska fiskiskip, sum fekk kraftblokk, hetta var í 1962. Frá 1963-72 sigldi hann sum stýrimaður við Beinir hjá sama reiðaríi. Hann sigldi sum stýrimaður við Norðborg hjá P/F Hvalnes frá 1972-88. Jefri var arbeiðsformaður á flakavirkinum Frost í Leirvík frá 1989 til 1993, tá hann fór umborð aftur á Norðborg, har hann er enn. Um árskiftið 1998/99 bleiv Norðborg seld til Klaksvíkar, og í 2000 bleiv ein onnur Norðborg (ex.Gardar) keypt.

Jefri giftist í 1961 við Gunnvør, f. Berghamar, úr Havn, og tey búsettust í Havn. Tey eiga børnini: Absalon, Annika, Sigurð og Tróndur.

## Símun og Magni í Snarskivuni

Hósdagin 2. oktober klokkan 16.00 lata Símun Poulsen og Magni Mikkelsen upp listaframsýning í Snarskivuni. Framsýningin verður allan oktober mánað.

Snarskivan er avgreiðslan hjá Tórshavnar kommunu, opið er mánadag til fríggjadag frá 9.00-16.00 tó hósdag til klokkan 18.00. Síðan Snarskivan lat upp í oktober 2000, hava nógv av Føroya fremstu listafólkum sýnt fram í snotiligu hølunum í gamla posthúsbygningum í Havn.

## 25 ára starvsdagur á Bileftirlitinum



1. oktober hevði Bjarni Sørensen í Havn 25 ára starvsdag á Bileftirlitinum. Bjarni er ættaður úr Húsavík, sonur Edith, f. Danielsen, og Óla Sørensen.

Hann er útbúgvin bilmekanikari, lærdi hjá Wenzel Petersen í Havn. Hann arbeiddi eina tíð sum bileftirlitsmaður í Hillerød.

Bjarni byrjaði sum sýnsmaður á Bileftirlitinum í Havn, og síðan hevur hann tikið útbúgving sum próvdómari til koyrikort. Síðan 1. mars 2000 hevur hann verið deildarleiðari á koyrikortdeildini á Bileftirlitinum.

Hann róði kapp sum ungur, og hevur hann havt stóran áhuga fyri hesi ítróttargrein. Hann hevur verið nevndarlimur og formaður í Havnar Róðrarfelag og í nevndini í Róðrarsambandinum, RSF.

Bjarni er giftur við Hildigunn, f. Sørensen, úr Havn. Tey eiga trý børn, Magnus, Allan og Elidu.

## Dagurin

**2. oktober. Ditlev.** Komin upp í halgimannatal í 1725. Ókent halgimenni. Upprunaliga týkst navn, samansett av orðunum *fólk og arvur.*